## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Andøvsgul upp í ein strúk av útsynningi og sólglottar, men eisini ælingur. Hitin millum 11 og 14 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útsynningi, um kvøldið minni vindur. Sólglottar, men eisini ælingur og hitin millum 10 og 13 stig.




**Veðrið Ólavsøkuaftan:**
Fyrrapartin fleyr til gul av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar, men seinnapartin lot av eystri og møguliga regn. Hitin millum 11 og 14 stig.

**Veðrið Ólavsøkudag og týsdagin:**
Fleyr til gul millum eystan og sunnan og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørkaflókar. Hitin millum 10 og 14 stig.

# Platform undir kav



*Hesa Laksastyrjuna fiskaðu teir umborð á Norðlýsinum herfyri. Nú endar hon sum ólavsøkumatur á Platform.*

**Diskotek Platform víðkar um virksemi sítt ólavsøkudagarnar og fer at bjóða fram eitt sjálvtøkuborð við nøkrum av tí, sum livir hinumegin vatnskorpuna.**

ÓLAVSØKUMATUR
*Rúnar Reistrup*

Platform verður um vikuskiftini mett at vera gott mið at dyrgja eftir ungum sprundum og sjeikaligum sjeikum. Men ólavsøkudagarnar verður ikki neyðugt hjá gestunum at dyrgja, tí tá verður diskotekið meira at líkna við eina avreiðingarstøð, har Birgir Enni borðreiðir við nøkrum av tí, sum havið kring Føroyar hevur at bjóða.

Laksur, hýsa, kalvi, kræklingar, øður og ein heldur meira óvanlig Laksastyrja, sum kokkurin sjálvur, Birgir Enni, fiskaði undir Føroyum herfyri, fara at liggja á sjálvtøkuborðinum í Platform ólavsøkudagarnar

Platform letur fyrstu ferð upp fyri sjálvtøkuborðinum í kvøld klokkan 18, og teir báðar ólavsøkudagarnar er klárt at fara til borðs longu klokkan 14.

Klokkan 23 øll kvøldini broytir Platform ham og gerst aftur dyrgingarmið hjá ólavsøkugestunum.

www.sosialurin.fo

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 5 |
| Nuuk | 3 |
| Qaqortoq | 6 |
| Ammassalik | 7 |
| Saint John's | 21 |
| Halifax | 20 |
| Reykjavík | 11 |
| Seyðisfjørður | 9 |
| Tórshavn | 11 |
| Lerwick | 14 |
| Aberdeen | 14 |
| London | 20 |
| Tromsø | 14 |
| Bergen | 11 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 20 |
| Keypmannah. | 18 |
| Helsinki | 21 |
| Moskva | 24 |
| Berlin | 20 |
| Warzawa | 23 |
| Kiev | 23 |
| Bukarest | 24 |
| Paris | 22 |
| Madrid | 29 |
| Róm | 27 |
| Malorca | 28 |
| Athen | 30 |
| Malta | 34 |
| Tunis | 32 |
| Beijing | 30 |
| New Dehli | 34 |
| Bangkok | 32 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | 12 |
| New York | 24 |
| Miami | 28 |
| Los Angeles | 25 |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | 32 |
| La Paz | 13 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 13 |

### LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 978 hPa yviri á Vesturlandinum fer í landnyrðing og brúgvalagið haðani til Føroya fer eystureftir.




**Í dag:**
Lágtrýstini við Ísland standa mestsum í stað, og eitt triðja lágtrýst, yvir Skotlandi stendur eisini í stað.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 24/07 kl. 06⁰⁰– 25/07 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 10,8°
Minsti hiti máldur í juli: 0,4° Mesti hiti máldur í juli: 20,2°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 4,0 mm – mált frá 24/07 kl. 06⁰⁰– 25/07 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í juli: 23,5 mm




## VESTFALLSKYRRINDI

30. juli: Mánin longst frá jørðini

Kelda. Álmanakkin 2002

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 26. juli | 09.09 | 21.31 | 08.09 | 20.31 | 08.24 | 20.46 | 11.09 | 23.31 | — | 12.09 | 07.24 | 19.46 | 06.24 | 18.46 | 09.24 | 21.46 | 10.24 | 22.46 | 08.54 | 21.16 | 10.09 | 22.31 |
| 27. juli | 09.53 | 22.13 | 08.53 | 21.13 | 09.08 | 21.28 | 11.53 | — | 00.31 | 12.53 | 08.08 | 20.28 | 07.08 | 19.28 | 10.08 | 22.28 | 11.08 | 23.28 | 09.38 | 21.58 | 10.53 | 23.13 |
| 28. juli | 10.33 | 22.53 | 09.33 | 21.53 | 09.48 | 22.08 | 00.13 | 12.33 | 01.13 | 13.33 | 08.48 | 21.08 | 07.48 | 20.08 | 10.48 | 23.08 | 11.48 | — | 10.18 | 22.38 | 11.33 | 23.53 |
| 29. juli | 11.13 | 23.32 | 10.13 | 22.32 | 10.28 | 22.47 | 00.53 | 13.13 | 01.53 | 14.13 | 09.28 | 21.47 | 08.28 | 20.47 | 11.28 | 23.47 | 00.08 | 12.28 | 10.58 | 23.17 | — | 12.13 |
| 30. juli | 11.51 | — | 10.51 | 23.09 | 11.06 | 23.24 | 01.32 | 13.51 | 02.32 | 14.51 | 10.06 | 22.24 | 09.06 | 21.24 | — | 12.06 | 00.47 | 13.06 | 11.36 | 23.54 | 00.32 | 12.51 |

5 707265 100050 >